## Lyon hevur einki hoyrt

Fjølmiðlar hava seinastu dagarnar skrivað dúgliga um, at Karim Benzema, framherji hjá Lyon, er á veg í annað felag. Real Madrid, Manchester United og Arsenal skuldu havt sýnt fraklendinginum áhuga, men tað er eftir øllum at døma ikki satt. – Vit hava einki tilboð fingið. Hvørki frá Real Madrid, United ella Arsenal. Vit hava prátað við leiðsluna í Real Madrid, men einki ítøkuligt kom burturúr, sigur Oliviver Blanc, tíðindastjóri í Lyon, við franska blaðið L'Equipe.




## Hedman í trupulleikum

Magnus Hedman, fyrrverandi svenskur landsliðsmálverji, er í løtuni undir illgruna at hava nýtt doping. Sambært svenskum miðlum hevur hann nýtt stanozol, sum er sama slagið, ið rennarin Ben Johnson nýtti undir OL í 1988. – Eg eri ósekur. Talan er um amerikanskan kost, sum eg havi fingið í meg, verjir Magnus Hedman seg við, sambært svenskum miðlum.

# Riddarin telvaði væl

**Hóast endaspurturin var framúr, so eydnaðist tað ikki Tvørabátinum at taka Riddaran, ið eina løtu tóktist skula vinna sannførandi sigur**

6-MANNAFØR MENN
*Jóannes Hansen*




Manningin á Riddaranum var tann meira uppsetta til jóansøkuróðurin, og megnaði eisini at draga longra stráið í beinharðari kapping við Tvørabátin á heimasjógvi
Mynd: Jens Kristian Vang

Fyri tveimum árum síðani var Tvørabáturin favorittur at vinna á Jóansøku á Tvøroyri. Tað var hann, tí hann í róðrinum frammanundan hevði vunnið á Fjarðastevnu.

Ta ferðina eydnaðist tað ikki Tvørabátinum at vinna. Tað var tætt við, men Sundabáturin var skutin frammanfyri Tvørabátin.

Hesa ferð var tað upp aftur tættari. Riddarin vann, men munurin var bara sjálvur stavnurin ella so.

Tvørabáturin legði bragdliga fyri í góðveðrinum, og tað eydnaðist Tvørabátinum at toga seg skutin framum hinar bátarnar. Men so svaraði Riddarin aftur, og tá ið bátarnir fóru at nærkast málinum, tóktist eingin ivi at vera um, at Riddarin fór at vinna.

So royndi Tvørabáturin at svara aftur. Áskoðararnir vóru vitni til ein rimmar endaspurt. Men tað eydnaðist akkurát ikki Tvørabátinum at taka Riddaran.

Hinir bátarnir fóru heilt afturav, og tað var Sundabáturin, sum vann kappingina við Smyril um bronsuplássið.

# Sama søgan á Argjum



Hjá 8-mannaførum var heldur eingin ivi hesaferð. Argjabáturin hevur enn onga kapping fingið í ár, og vann sannførandi. Tó er munurin til nummar tvey tódnaður niður í 10 sekund, sum tó er smáar fýra bátslongdir
Mynd: Jens Kristian Vang

**Argjabáturin vann fyri fjórða ferð sannførandi sigur, tá ið tað var kappast á Trongisvágsfirði**

8-MANNAFØR
*Jóannes Hansen*

Søgan um kappingina millum 8-mannaførini – um tað kann kallast kapping – er tann sama, sum hon hevur verið í alt summar.

Á Trongisvágsfirði var Argjabáturin aftur væl fremstur, og aftur sóust teir á Argjabátinum at leypa upp í loft í kæti yvir sigurin, tá ið teir vóru komnir á mál, og skotið hevði dunað.

Tað fer neyvan at eydnast nøkrum báti at hótta Argjabátin í teimum trimum róðrunum, sum eru eftir í hesum kappingarárinum.

Nú er møguleiki fyri at manna seg bara á Ólavsøku. Tað hevur ljóðað, at tað verður arbeitt við eini roynd at geva suverena Argjabátinum kapping frá Argjahøvda og inn undir Skipafelagið ólavsøkuaftan.

Hvussu tað verður við tí, fæst at síggja um fýra vikur. Inntil tá verða FM kappróðrar í Fuglafirði og í Sandavági, og einki bendir á, at nakar fer at gera nakað við Argjabátin.